Hósdagur 15. mars

SVF

18.30 Pinkupól 2
18.35 Jumanji 7
19.00 Gandakellingin sum stjól prinsin
19.10 Pinocchio í Hollywood – teknifilmur
19.20 Basalt (e)
20.00 Dagur og Vika við Grannum okkara
20.50 Ferðaliðið 10:30 – donsk dramarød
21.50 Starvsnæmingurin – seinasta sending
22.10 Krimitímin: Dalziel og Pascoe 2:2
23.00 DR-Dokumentar: Søgur av einari politistað
00.00 Liðugt

EURO SPORT

07:30 Tennis
08:30 Golf
09:30 Cross-Country Skiing
11:00 Car On Ice
12:00 Car Racing
12:30 Tennis
13:30 Cycling
14:00 Cycling (Live)
16:00 Tennis
17:15 News
17:30 Xtreme Sports
18:00 Olympic Games
18:30 Football
19:30 Tennis
20:00 Tennis (Live)
21:30 Cycling
22:00 News
22:15 Football
00:15 News
00:30 Close

BBC PRIME

00.00 Tlz American Visions
01.00 Tlz Horizon: Nanotopia
02.00 Tlz What Have The `60s Ever Done For Us?
02.10 Tlz Background Brief: Therapy On Trial
02.30 Tlz The Science Of Climate?
03.00 Tlz The Next Big Thing: Voyage To The Bottom
03.30 Tlz Healing The Whole
04.00 Tlz Quinze Minutes Plus
04.15 Tlz Quinze Minutes Plus
04.30 Tlz Landmarks: Portraits Of Britain
04.50 Tlz Make Or Break
05.30 Tlz Starting Business English
06.00 Toucan Tecs
06.10 William's Wish Wellingtons
06.15 Playdays
06.35 Insides Out
07.00 The Really Wild Show
07.30 Ready Steady Cook
08.00 Style Challenge
08.25 Change That (Set 01)
08.50 Going For A Song
09.30 Top Of The Pops Plus
10.00 Antiques Roadshow
10.30 Tlz Prohibition: 13 Years That Changed Country Tracks
11.30 Ready Steady Cook
12.30 Style Challenge
13.00 Doctors
13.30 Eastenders
14.00 Change That (Set 01)
14.25 Going For A Song
15.00 Toucan Tecs
15.10 William's Wish Wellingtons
15.15 Playdays
15.35 Insides Out
16.00 The Really Wild Show
16.30 Totp Eurochart
17.00 Changing Rooms
17.30 Doctors
18.00 Eastenders
18.30 Animal Hospital
19.00 Yes Minister
19.30 Blackadder Ii
20.00 Casualty
21.00 Absolutely Fabulous
21.30 Totp Eurochart
22.00 The Dark Room
23.15 Holiday Snaps
23.30 Doctor Who: Arc Of Infinity

BBC WORLD

00.00 BBC News
00.30 Holiday
01.00 BBC News
01.30 The Money Programme
02.00 BBC News
02.30 HARDtalk
03.00 BBC News
03.15 World Business Report
03.30 Top Gear Awards
04.00 BBC News
04.30 The Money Programme
05.00 BBC News
05.30 Asia Today
06.00 BBC News
06.30 HARDtalk
07.00 BBC News
07.15 World Business Report
07.30 Talking Movies
08.00 BBC News
08.30 World Business Report
08.45 World Sport
09.00 BBC News
09.30 HARDtalk
10.00 BBC News
10.30 Click Online
11.00 BBC News
11.30 World Business Report
12.00 BBC News
12.30 Panorama
13.00 BBC News
13.30 World Business Report
13.45 Asia Today
14.00 BBC News
14.30 HARDtalk
15.00 BBC News
15.30 Talking Movies
16.00 BBC News
16.30 The Money Programme
17.00 BBC News
17.30 Asia Today
17.45 World Business Report
18.00 BBC News
18.30 HARDtalk
19.00 BBC News
19.30 Click Online
20.00 BBC News
20.30 The Money Programme
21.00 BBC News
21.30 HARDtalk
22.00 BBC News
22.30 Panorama
23.00 BBC News
23.30 HARDtalk

3 SKAIRI

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:05 TV-shop
08:35 Garfield og venner
09:00 Sunset Beach
09:50 Træneren
10:20 Horton-sagaen (G)
11:10 Horton-sagaen
12:00 Melrose Place - classic
12:55 Vild med dig
13:25 Panter-tanter
13:55 Mig og fremtiden
14:50 Baywatch
15:45 Min kære familie
16:10 Ricki Lake
18:10 Dagens Nyheder på TV3
17:30 Med på moden
18:00 Alle tiders barnepige
18:30 Baren
19:00 GRISK - når det gælder
20:00 TV Razzia
20:30 Det skøre hold
22:30 Baren (G)
23:00 Dagens Nyheder på TV3
23:10 Vore værste år
23:40 Simpsons
00:10 Ellen
00:40 Kojak
01:40 Drøm videre
02:10 I lyst og nød
02:40 Ellen (G)
03:05 Ricki Lake (G)
04:05 Godnat

ÚTVARP FØROYA

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur Hansa Petersen á Strondum lesur
07.15 Barnaløtan Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri
07.30 Tíðindi
07.35 Morguntónleikur
08.00 Tíðindi
08.03 Morgunrásin
09.00 Tíðindi
09.03 Morgunrásin
09.50 Morgunlestur (e) Hansa Petersen á Strondum lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fyrrapartsløg Kim Hansen stílar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Hjá dvørgum í Níðafjøllum (e) Hans Tórgarð lesur 13. part av framhaldssøgu eftir Annfinn í Skála
11.30 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Í grannalagnum (e)
13.30 Tónleikur
14.00 Kjaktorgið (e)
15.00 Tíðindi
15.03 Frívaktin Sending við tónleiki og práti um sjómanslív. Elis Poulsen skipar fyri
16.00 Tíðindi
16.03 Prix Føroyar (e) Ginna Midjord stílar fyri
17.00 Tíðindini
17.05 Í Víngarðinum Alexander Samuelsen leggur til rættis
18.05 Barnaløtan (e) Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Hetjur í Skriftini - Móses tann stóri leiðarin
Seinni partur. Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Harmonikutónar Flóvin Jacobsen skipar fyri
20.30 Á sanganna veingjum Gunnvør Poulsen stílar fyri
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur Ginna Midjord skipar fyri
22.00 Rák Anita Ottosen stílar fyri
23.00 Tíðindi

Rás 2 FM 102 FM 107

10:45 Orðið Bibliulestur v/ Anju Hansen
11:00 Birgir Beinleiðis Birgir Sondum við gesti
12:00 Tíðindi & Lýsingar
13:00 Leysaløtan Innsløg, prát og tónleikur
14:00 Ynskiløtan Heilsur frá lurtarunum
15:00 Tíðindi og lýsingar
15:15 Ynskiløtan (framhald)
16:00 Laila Beinleiðis Country, Laila Jacobsen leggur til rættis
17:00 Norðlýsið! Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík. John William og Oliver Joensen leggja til rættis.
18:00 Tíðindi og lýsingar
18:15 Lættur tónleikur
19:00 Orð á leiðini EVR-sending "Biblian – hvussu varð hon skrivað?". Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og lýsingar
21:15 Orðið (e) Bibliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Girlzone Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo

Lindin FM 91,9

13.00 Byrjan – Dagsskrá
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin (e) v/ Simun Hansen
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Tónleikur
17.00 Ungdómssendingin Get Ready v/ Rigmor og Rebekku
18.00 Dagsins Orð
18.05 The Finishing Touch ensk sending við tónleiki og práti. Vertur er Alex O'Campo
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.15 The Finishing Touch heldur fram
20.00 "Við Honum út á Golgata" Upplestur úr bókini hjá Frederik Wisløff. Ur Jesusar liðingarsøgu.
20.10 Tónleikur fyri børn
20.30 Okkara dagliga breyð
20.55 Dagsins Orð
21.00 Bønarlinjan við gesti. Bønarevni kunnu ringjast inn frá 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379 Vertur tykkara hesarferð: Jenis av Rana.
Vit gevast uml. middnátt

Hetjur í Skriftini - Móses tann stóri leiðarin

SVF Hóskvøldið kl. 19.00

Móses hevur nú fingið boð frá Guði um at fara til Farao í Egyptalandi, og biða hann lova ísraelsmonnum at fara. Farao sýtir, og Guð sendir so tær 10 plágurnar yvir landið. Tá letur hann fólkið fara. Men allir súður vóru ikki syftar enn hjá Mósesi, og long var leiðin heim.

Armgarð Arge stílar fyri

TV Razzia (4)

3 Hóskvøldið kl. 20.00

Camilla Miehe-Renard kannar nærri ein bólk av ungum, sum fer skíferð fyri at finna nýggjar makar.

Camilla Miehe-Renard fylgir við einum bólki av ungdómum, sum eru farnir at standa á skíum – og kanska skora ein av teimum, ið er við í ferðalagnum.

Teir 75 luttakararnir á ferðini kenna ikki hvønn annan frammanundan. Tey hava bara havt samskifti á internetinum, og tað ígjøgnum netið, at ferðin er fyriskipað. Felags fyri luttakararnar er, at tey eru single, og at tey vilja finna nýggjar vinir ella nakað meira enn tað.

Tað svaka liðið

– Amerikanskur skemtifilmur frá 1989 (Major League)



3 Hóskvøldið kl. 20.30

Tað harða handilskvinnan Rachel Phelps vil flyta baseball-liðið The Cleveland Indians úr Cleveland til Miami. Men eigararnir hava ein sáttmála við leikvøllin, sum forðar fyri hesum.

Ráð eru fyri tí, og Rachel hevur lagt ein snilda ætlan. Hon finnur nakrar gamlar baseballspælarar, sum ikki duga sítt kramm longur, at spæla fyri liðið. Tað eydnast henni at finna nakrar avbera vánaligar spælarar.

Hetta fær eigararnar av leikvøllinum at bøna liðið um at flyta til Miami. Rachel Phelps hevði tó ikki roknað við, at teir vánaligu og gomlu spælararnir høvdu ætlanir um at halda fram við at spæla baseball, og at teir ætla sær at vinna meistaraheitið.

ítróttur

Nr. 47 • fríggjadagur • 9. mars 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

VÍF–Tjaldur 39–21 (22–10)

Gullið nærkast

VÍF restar nú bert fýra stig í at gerast Føroyameistari, og tað skal meira enn gott hugflog til at ímynda sær, at teir ikki fáa hesi

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Í landskappingini hevur árið higartil verið ein dansur á rósum hjá vestmenningum, sum at kall abert hava upplivað viðgongd í hesum. Sjálvt teir dystirnar, har spælið ikki hevur verið eftir vild, eru stigini komin í sekkin, og tí var ikki annað væntandi, enn at tey eisini skuldu koma móti Tjaldri.

Tveir dystir afturat

Stigini komu eisini, og frá fyrsta bríksli tóktist greitt, at her skuldu gestirnir so einki hava at siga. At kalla allan dystin tók heimaliðið tvey fyri eitt, og ikki minst man góða avrikið hava verið hugaligt, tá hugsað verður um, hvussu striltið tað annars hevur gingið í seinastuni.

Tað var eisini ein væl nøgdur Martin Hummeland, sum vit fingu orð á eftir stórsigurin.

– Hatta spælið hava vit saknað leingi, og tað er ein góð kensla, at alt nú tykist at rigga aftur hjá okkum. Tað øgiliga væl frá byrjan av dystinum, og ikki minst riggaði væl í verjuni, samstundis sum bæði Eli og Bárður stóðu seg væl í málinum. Eisini riggaðu skotini væl, og ikki minst John Zachariassen var allan dystin ein sera stór hóttan móti málinum hjá Tjaldri.

– Eisini haldi eg, at vit fingu gjørt tað sera torført hjá teimum í álopspartinum, har tað eina mest var Sverra, sum teir royndu at spæla upp til. Í fyrra hálvleiki fekk hann eisini fleiri ferðir sníkt seg til skot, men hetta fingu vit so rættað í steðginum, sigur Martin Hummeland, sum allar helst kann rópa seg føroyameistara nakað skjótt.

– Nú skulu vit bert hava fýra stig afturat, og tað eiga vit at klára. Vit hava hoyvíkingar um vikuskiftið, og í komandi viku skulu vit so spæla útsetta dystin móti StÍF. Gongst eftir vild í hesum, kunnu vit tá rópa okkum meistarar.

Og tað er ilt at ímynda sær, at vestmenningarnir ikki kunnu gera tað um eina viku. Einki av hinum liðunum tykist hava somu styrkina sum teir, og nú glið aftur tykist vera komið á spælið, eigur restin av kappingarárinum bert at vera ein avgreiðsluspurningur, har mál terra má vera at enda kappingina við fullum stigatali.

Vestmenningar eru nú bert fýra stig frá gullinum, og gongst eftir vild, verður hetta tryggjað í komandi viku, tá vitjað verður á Skála

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
VÍF: Áki Olsen 8, John Zachariasen 8, Sámal Joensen 5, Ingi Olsen 5(1), Martin Hummeland 5, Agnar Joensen 4, Petur Fr. Joensen 2, Bárður Nielsen 1, Sjúrður Holm 1
Tjaldur: Sverri Justinussen 8((2), Arnfinn Langgaard 4, Zoran Sarcevic 3(1), Mortan Hansen 3, Tummas Magnussen 2, Ragnar Olsen 1
Brotskøst: VÍF 1, Tjaldur 4
Útvísingar: Tjaldur 3
Dómarar úr Kyndli: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

StÍF–KÍF 30–33 (14–19)

KÍF basti strandingum

StÍF tykist fullkomuliga steðgað upp eftir steypasigurin, meðan kollfirðingar rættiliga hava fingið ferð á

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Síðani strandingar fyrr í vár vunnu steypafinaluna, er tað sum um okkurt slag av mettu er komið á teir. Kanska ikki so løgið, at teir ótilvitað hava verið ov nøgdir um hetta, men við verandi gongd, skulu teir ikki vera alt ov vísir í at fáa heiðursmerki.

Mótstøðulið teirra mikukvøldið vóru kollfirðingar, og hjá teimum hevur gongdin bara verið betri, sum árið hevur gingið. Fyrra kappingarhálva var stríggin, og í nógvum dystum mistu teir stig í evstu løtu, men síðani steðgin hevur bara gingið ein veg.

Positiva gongd teirra helt fram mikudagin, og tað vóru eisini gestirnir, sum høvdu tamarhald á størsta partin av dystinum. Munurin millum liðini varð skaptur longu í fyrra hálvleiki, og eftir hetta ráddi mest av øllum um at halda tørn. Hetta eydnaðist eisini, og heilt nær við at venda dystinum vóru strandingar ikki. Tað mest stóð á, var munurin komin niður á tvey mál, men eftir eitt time out fingu kollfirðingar aftur takið, og so hildu teir allan vegin heim.

Hóast gongdin hevur verið góð, kann Petur Martin ikki lata vera við at iðra seg um, at kollfirðingar eru komnir ov seint í gongd

Álopið riggaði

Eftir dystin var tað eisin ein væl nøgdur liðskipari hjá kollfirðingum, sum vit fingu orðið á.

– Hatta var ein góður dystur fyri okkara viðkomandi. Verjuspælið var kanska ikki heilt so gott, sum tað skal vera, men í álopspartinum riggaði stak væl hjá okkum. Ikki minst hjá Iljan Topic, sum eisini varð mansvardur í stórum parti av dystinum, men sum kortini fekk fleiri mál á skaftið, sigur Petur Martin Johansen.

Víðari sigur hann, at eftir at Iljan varð mansvardur, gjørdist eisini betri pláss til leikandi venjarin, Durica Tomic.

Annars haldi eg, at tað gekk bara vel hjá at kalla øllum liðnum, og fram móti endanum av dystinum fór Óla Christan rættiliga at gera um seg í málinum, sigur Patur Martin.

Hjá mótstøðuliðnum helt hann, at tað eina mest var venjarin, Costin Dumitrescu, sum gjørdi um seg, tó at fleiri aðrir leikarar eisini vóru væl við.

Ov seint

Hóast væl nøgdur um dystin, so er tað tó eitt, sum nívur liðskiparan hjá kollfirðingum.

– Spælið hjá okkum hevur koyrt sera væl í seinastuni, men eg má tó iðra meg um, at vit eru konir somikið seint í gongd. Sjálvandi hava vit enn vónir um at klintra longur upp á stigatalvuni, og vit hava jú Neistan um vikuskiftið, men hevði úrtøkan verið betri í grundspælinum, høvdu vit verið nógv betri við.

Tað er eisini líkt til, at okkurt er í hesum, sum Petur Martin sigur. Tá grundspælið var av, var KÍF á aftasta sessinum í deildini, men síðani tað hevur bert gingið framá. Somikið væl hevur gingist, at tað í endaspælinum bert eru VÍF og Kyndil, sum hava fingið fleiri stig, og Kyndil hevur enn tá spælt ein dyst meira.

Hvussu nógv longur tað fer at eydnast kollfirðingunum at røkka, fara komandi dystirnir at vísa, men í løtuni tykist tað langt í frá ógjørligt at vinna seg longur upp enn verandi fimta plássið.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
StÍF: Artur Johansen 7(4), Costin Dumitrescu 5, John Petersen 5, Marius Joensen 4, Jón Rasmussen 3, Andre F. Danielsen 3, Alexandur Johansen 2(1), Leivur Justinussen 1
KÍF: Iljan Topic 10, Durica Tomic 7(2), Jákup Dam 6, Petur Martin Johansen 4, Petur Martin Poulsen 4, Regin Petersen 1, Kristian Madsen 1
Brotskøst: StÍF 5, KÍF 2
Útvísingar: StÍF 3, KÍF 4
Dómarar úr H71: Petur S. Dahl og Bárður Brimvík